

HVØR SKAL STÝRA FØROYUM?

Seinastu tíðina hevur nógv kjak verið um, hvørt vit hava (havt) nóg góðar politikarar, ella ikki. Summi (serliga politikarar) hava fílst á hetta og víst á vandan við at finna syndabukkar. Men tað kann ikki forða okkum at líta í bakspeglið - serliga okkum, sum ung eru, tí okkara bólkur er verst fyri bæði so og so, hann er als ikki umboðaður í tinginum, og hann hevur tí onga ábyrgd av elendigheitini, sum uppvaksandi ættarliðið skal gjalda. Hann hevur snøgt sagt als onga ávirkan á politikk! Kortini liggur lagna okkara í hondunum hjá politikarunum, og tí er tað so avgerandi neyðugt, at vit hava álit á teimum - og teir á okkum.

Júmen - kann onkur siga - tey ungu hava ikki verið nóg røsk at valt ung á ting, eins og kvinnur ikki velja kvinnur! Men, hinvegin, so hava flokkarnir heldur ikki verið nóg raskir at stilla ung upp.

Almenna fornuftið sigur annars, at eitt fólk fær teir politikarar, sum tað velur sær. Tí kunnu vit siga, at politikararnir eru tey gløggastu okkara - ella hvussu?

Javnaðarflokkurin ført fólkaflokspolitikk

Tey kallaðu tað eina ódratisjonella samgongu millum javnaðarflokkin og fólkaflokkin. Og tað má sigast, um kagað verður nøkur ár aftur í tíðina.

Javnaðarflokkurin fór til val upp á 10 gylt lyfti. Hesi lyfti hevur flokkurin so eftirtrykkiliga svikið - er vanlig fólkahugsan í dag. Ja - Ingeborg vil enntá vera við, at hann er vorðin ein fólkaflokkur.

Er tað sætt, sum Ingeborg førir fram, so hava vit ikki brúk fyri einum javnaðarflokki í niðurgangstíðum - so eigur flokkurin at vera avtikin og endurstovnaður tá betri tíðir - oyðsl i- og útgjaringartíðir eru komnar. - Mótsætt, so kunnu vit spyrja, um flokkurin ikki byggir á eina sunna og skilagóða ideologi, sum hesi bæði seinastu árini hevur vart nakað av tí, ið staðið hevur fyri skotum - ella hvat halda fakfeløgini? Er Ingeborg bara góð við javnaðarflokkin, tá hann er í andstøðu? - Tá fær hann so ikki gjørt nógvar skreytir!

Men latið okkum fara til nýggju samgonguna.

Henda samgonga er so natúrlig - halda øll. Hetta er júst samgongan, ið átti at verðið skipað í 1990, men tá vóru tað onnur viðurskifti, ið forðaðu, verður sagt.

Tjóðveldismenn skuldu slikka sárini teir fingu í valósigrinum, og nýkonverteraða Helena kundi ikki soleiðis beinanvegin krúpa »heimaftur« í javnaðarflokkin.

Vallyfti skulu broytast

Onkur klókur maður hevur sagt, at politikkur er at »vilja broytingar« - ella »at vilja«. Við okkara heimligu erfaringum kundu vit kanska sagt, at politikkur er »at broyta«.

Vit siga ikki at veljarin er býttur - nei, latið okkum heldur siga, at veljarin er »heldur stuttmintur«. Politiska minnið er (tíbetur fyri politikararnar) ikki serliga langt - bert nakrar mánaðir.

Politikarar siga eitt - teir lova annað og gera tað triðja. Tað er »politikkur«. Og tað er at »vilja« (broytingar). »Politikkur« og »broytingar« hava nakað við hvørt annað at gera. Høvdu vit ongar broytingar - so høvdu vit ongan politikk. Tí kunnu vit siga, at veljarin er ov stuttmintur (ikki býttur), um hann trýr, at vallyfti politikkaranna halda.

Løgið er tað kortini: Nú tá fólk eru um at gloyma tey 10 vallyftini hjá javnaðarflokkinum og tingmenn eru farnir at troyttast av at tveita tey í høvdið á javnaðarmonnum, ja so Gudhjálpimær um ikki nýggju landsstýrisfólkini koma við somu frasum: »Arbeiði í gongd, hjólini at mala, venda gongdini, fólk í arbeiði o. s. fr.«

At ríkni politikkurin broytist, tá flokkar koma í samgongu, kunnu vit bert enn einaferð sláa fast. Men, sum áður nevt, »politikkur er at vilja broytingar...«: - Sjónleikur, spæl fyri gallarínum, fupp og bedrag og hvat annað vit kunnu kalla tað. Politikarar tykjast allir sum ein at vera superværlærdir sjónleikarar.

Latið okkum dvølja við nakrar teirra:

Óineressantir tjóðveldismenn

Tjóðveldismenn eru nakað fyri seg. Teir duga væl at snúgva sær og sjálvir eru teir púrasta feilfríir. Teir geva altíð øðrum skuldina. Og soleiðis var eisini við valósigrinum seinast. Tá góðu teir sambandsflokkinum skuldina.

Afturgongdin var so stór, at bert fýra tingmenn vóru eftir - kvinnurnar vórðu varpaðar út, og (orsakið orðavalið) teir mest óinteressantu menninir vórðu eftir, Finnbogi, Signar, Heine og Hergeir.

Teir hava av øllum alvi roynt at vent politikkinum - nú skulu teir vísa sína tjóðskaparkenslu. Jú, teir fóru at reka tjóðveldispolitikk aftur. Teir fóru aftur at tosa um teir fimm sambandsflokkarnar og tann eina loysingarflokkin. Javnaðarflokkurin var sjálvsagt støtsti Judasurin. Finnbogi Ísakson nýtti hvørt høvi at kalla tann annars so meinaleysa og hampuliga ríkisumboðsmannin, Bent Klinte, fyri »amtmann«, og vildi við tí leggja dent á vanvirðing sína fyri dønum og tí, ið danskt er. Jú, tað var sanniliga »politikkur«.

Frá loysing - til samband

Ábyrgdina fyri fíggjarliga óskilinum í Føroyum fingu eisini danir. Føroyingar høvdu einki skeivt gjørt - nei, tað var heimastýrislógin, sum danir kroystu niður yvir okkum!!??

Ein maður, ið eisini skuldi hava nasjonalistiska koyrilin, var Richard Mikkelsen, ið varð sendur hendavegin at hjálpa okkum. Hann fekk eyknevnið Rikkard Leyvuhjarta, og soleiðis varð hildið fram. Alt hetta endaði við, at tjóðveldisflokkurin legði fram uppskot um loysing. Nú skuldi slítast frá dønum - hesum harrafólkinum, ið hevði skuldina av øllum landsins ólukkum.

Men hvat? Nú samgongan er skipað hevur pípan fingið annað ljóð. ***»Bent Klinte, RÍKISUMBOÐSMAÐUR hevur gjørt eitt megnar arbeiði...«***, segði Finnbogi í útvarpinum 28. mai av Christiansborg. Leggið til merkis, nú er hann ikki »amtmaður« longur - og Finnbogi tosar ikki um loysing, nei, nú er okkurt sum fyrst skal »avviklast«.

Eitt miseydnað »come-back«

Tað er einki at ivast í, at okkum tørvar meiri gjøgnumtrekk í føroyskum politikki. Hann er ov keðiligur og stirvin.

Tí høvdu vit sætt at siga væntað, at tjóðveldisflokkurin fór at endurnýggja seg, nú hann kom í landsstýrið - við nýggjum fólki. Men nei. Tveir tingmenn, sum hava verið við í politikki í ávikavist 23 og 27 ár fóru út í nesið.

Men tað var ikki nóg mikið við tí. Teir hava heldur ikki latið tingsessirnar til nummar tvey á listunum, sum í báðum førum eru nýggj, spennandi fólk, ið ikki hava roynt seg á tingi. Hetta er forkastiligt. Men ikki nakað sermerkt fyri tjóðveldisflokkin - sjálvt javnaðarfólk hava gjørt tað sama. Men hetta sigur kortini nakað um formann floksins:

Finnbogi plagdi at vera valdur í Norðoyggjum. Men í 1988 stillaði hann upp í Suðurstreymi. Hann gjørdist ov stuttur. Kvinnurnar báðar, Karin og Jóngerð, vóru valdar í báðar sessirnar, sum tjóðveldisflokkurin vann í Suðurstreymoyar valdømi. Finnbogi gjørdist nummar trý.

Bert Jóngerð hevur latið sessin frá sær til tíðina

Tá fólka-, tjóðveldis-, sjálvstýrisflokkurin og Tordur (hvønn flokk hann so hevði tá) skipaðu samgongu í januar 1989, gjørdist Finnbogi landsstýrismaður - eitt plástur á sárið. Men Finnbogi vildi hava meira - hann vildi gerast formaður floksins og so mátti hann í tingið.

Tá sama samgonga slitnaði um jóansøkuleitið, juni 1989, varð landsstýrið broytt. Nú vóru tað Fólka, sambands, og tjóðveldisflokkurin, ið samstarvaðu. Broytingar vóru gjørdar, og Jóngerð Purkhús fór í landsstýrið aftur ístaðin fyri Finnboga.

Tað sermerkta við hesum var tó - og tað er ikki vanligt - at eitt púra natúrligt demkratiskt skifti fór fram. Tí - á sama fundi sum landsstýrið skuldi veljast, legði Jóngerð Purkhús løgtingssessin frá sær. T. v. s., at Finnbogi (sum var eykatingmaður tá) gjørdist tingmaður sama dag, sum Jóngerð fór í landsstýrið. Tað skal Jóngerð eiga - hon er tann einasti landsstýrismaður, sum hevur latið sessin frá sær beinanvegin. Vanliga vilja landsstýrismenn hava báðar sessirnar eina tíð. Orsøkin er helst pengarnir - ella hitt; at halda onkrum »konkurrenti« burtur.

Demokratiið bert galdandi til egnan fyrimun

Á henda hátt gjørdist Finnbogi formaður floksins. Hann megnaði aftur at skapa sær ein »figur« og tá Karin ikki stillaði uppaftur til valið í 1990, var hálva slagið vunnið. Úrslitið á 90-valinum var tó álitisváttan til Finnboga og eitt sjokkval fyri Jóngerð - hon gjørdist nummar trý, og Hildur Paturson nummar tvey.

Tað sum nú er áhugavert, er orsøkin til at Finnbogi ikki hevur latið Hilduri tingsessin enn???. Hetta undrar - serliga tá havt verður í huga, hvussu demokratiskt tað var, tá *Finnbogi sjálvur var í hennara stað*.

Vit hava ein mistanka: Finnbogi vil ikki hava Hildur inn - hon kann hótta hann á valinum komandi ár, og Signar vil ikki hava Hans Tausen Olseninn fyri seg.

Logikkurin: Demokratiskt tá tað er til *mín* fyrimun. Hetta er jú eisini ein »broyting« - og tað »at vilja broytingar« er jú politikkur.

Nokso nýtt gamalt sjálvstýri

Sjálvsstýrispresturin er nýpolitikari - vit kenna hann ikki politiskt, men kunnu fegnast um at síggja nýggj andlit.

Men Lasse - sum gjørdist tingformaður, hann skyldar sínum veljarum at seta Dúgvuna í sigling aftur. Serliga hann (tó saman við Signari og hinum eysturoyartingmonnunum)gjørdi nógv burtur úr at siga fólki, hvussu óreinur Svend Åge var, tá hann legði Dúgvuna. Segði at hon gav yvirskot. Men hví siglir Dúgvan ikki nú?

Okkum tørvar seriøsitet

Nú átti tíðin at verið komin til eitt generatiónsskifti á tingi. Fólk eiga at hugsa seg betur um, hvønn tey velja. Eins neyðugt, sum tað er, at allir landspartar eru umboðaðir, er tað, at tey yngru og kvinnurnar eisini eru umboðað.

Vit halda - ærligtalt - at ov nógv tvætl verður viðgjørt á tingi. Politikkurin er ikki nóg seriøsur. Hvussu skulu vit taka politikarar álvorligt?

Skulu vit taka Edmund álvorligt, tá hann sigur, at sambandsflokkurin stendur fyri øllum tí góða og er ímóti øllum illum? Tá hann sigur, at alt gott , sum kemur úr Danmark, er sambandsflokkinum at takka? Man Nyrup yvirhøvur kenna Edmund?

Skulu vit taka Finnboga Isakson álvorligt, tá demokratiið bert virkar til hansara fyrimun?

Skulu vit taka Lassa álvorliga, tá hann (í andstøðu) pástendur at hann kann fáa Dúgvuna at geva yvirskot, tá hann ikki eingong megnar at fáa hana í sigling aftur meðan hann situr í landsins hægsta sessi? (tingformaður)

Álvaratos - skulu vit taka Nielspaula og Tord álvorligt? Tað skal ein heilur vitinskapur til fyri at halda skil á, hvør klandrast við hvønn, og hvør nú eigur rættin til at pynta seg við heitinum »kristiligur«!

Skulu vit taka Olaf Olsen álvorligt? - Hann lovar at fara úr tinginum, um aðrir koma at seta okkum treytir. Men tá egin áhugamál eru í vanda, tá er hann altíð til reiðar - hvat skulu vit halda um tað? Er hann ein hampamaður - ella ein banditt-ur?

JAVNAÐARMENN! ÚTPURRING!

Javnaðarflokkin er okkara flokkur - men kritikkur er altíð góður.

Vit hava 13 javnaðarfólk í landsstýri og á tingi. Tað eru eitt nú bert 4 tjóðveldis**menn**. Also 3,25 ferðir so nógv javnaðarfólk.

Hvat gera tey? Hví hoyra vit einki til tey? Hví eru tey ikki betur organiserað? Tey fáa jú løn - og ferðapengar! Tey máttu havt høvi at arbeitt konstruktivt - við at forma politikkin og komið við nýhugsanum, heldur enn við jánkasligum, heimføðisligum mjarri um lokal/egin áhugamál. Onkur er enntá farin fornermaður til hús!

Hví kann tingarbeiðið ikki takast í størri álvara? Hví kunnu tingmenn ikki noyðast við at vera tingmenn burturav, heldur enn at hava tað sum hobby?

Rættast hevði verið, at javnaðarflokkurin tók sær um reiggj, og skipaði seg á sømiligan hátt - legði fram strategi, ætlanir, kom við sínum boðskapi - ja, bart út sagt arbeiddi konstruktivt. Vit áttu jú at merkt, at javnaðarflokkurin hevði **dupult** so nógvar politikarar, sum nakar annar flokkur!!!

Flokkurin fær jú pengar frá tí almenna til politiska upplýsing - er ikki júst hetta »politisk upplýsing?«

Flokkurin hevur 10 tingsessir. Er ikki ætlanin at varðveita teir - ella kanska fáa fleiri næstu ferð? - Storkurin kemur ikki við teimum - so vilja politikararnir veruliga nakað við flokkinum, so vísið tað við veruligum politiskum arbeiði!!!!!

Nei til sjálvboðið diktatur

Vit hava nú verið vitni til, at aðrir hava tikið vald frá okkum. Eitt ættarlið av politikarum og vinnulívsmonnum hevur ikki megnað at stjórnað hesum landi. Tí kunnu vit spyrja, um tíðin ikki er komin til eitt generasjónsskiftu?

Men - um áður sagt, so fær eitt fólk teir politikarar, tað velur sær. Tí er bert ein máti at fáa - um man so kann siga - fornuftigari gjøgnumsnitspolitikarar. Tað er, at so nógv sum gjørligt taka lut í politiskum arbeiði. Taka lut í politiska orðaskiftinum, taka lut í politiskum virksemi í politiskum feløgum, siga sína meining ærliga og reiðiliga.

Vilja vit veruliga hava ávirkan á, **hvør skal stýra Føroyum**, so mugu vit taka í egnan barm, hugsa væl um hvønn vit velja og síðan krevja okkara rætt.

Tað er einasti máti, um vit vilja sleppa undan »sjálvbodna diktaturinum« sum vit annars geva etableraðu breyðpolitikarunum...

Frá SU í Føroyum

Árligi aðalfundurin verður
sunnudagin 5. september 1993 í
hølum felagsins á Argjum.
Nærri verður lýst seinni.

Nevndin

So nógvar politikarar eiga vit:

Javnaðarflokkurin	14*	36,8%
Fólkaflokkurin	8*	21,1%
Sambandsflokkurin	6	15,8%
Tjóðveldisflokkurin	4 (6?)	10,5%
Sjálvstýrisflokkurin	4	10,5%
Kristiligi Fólkafl.	1	2,6%
Miðflokkurin	1	2,6%

* *(1 er í fólkatinginum)*

vænligt prent-
alt upplagið